gult cyan magenta svart



# Myndugleikarnir áttu at sagt frá ynsktu teir tað øðrvísi

**-Vit hava arbeitt eftir bókini og hava hildið okkum til tað, sum er avtalað. Um so var, at føroyskir myndugleikar vildu hava okkum at arbeiða øðrvísi, so áttu teir at verið komnir við hesum boðum fyrr.**

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Hesi orðini eigur Magne Skorpen hjá Statoil. Hann hevur samskipað arbeiðið at velja út egnaðar fyritøkur at bjóða uppá útgerðarvirksemi í Føroyum. Tað hava verið fýra serfrøðingar í útgerðarvirksemi hjá Statoil í Noregi, sum hava arbeitt alt tilfarið frá samtøkunum, ið vóru við í sokallaðu prekvalifiseringini. Leiðarin fyri bólkinum er Magne Skorpen, sum dagliga arbeiðir við at samskipa sáttmálar í sambandi við tað norðmenn kalla oljubasar. Hann hevur verið við til at gera nógvar slíkar sáttmálar og standa fyri prekvaliferingum eins og tí føroysku.

### Dumpaðu m.a. uppá dýpið og infrastruktur

Vit spurdu Magne Skorpen, hvussu tað ber til, at teir í prekvalifiseringini hava útilokað eitt felag sum Norserv, ið hevur samstarv við eina so roynda útgerðarstøð sum hana hjá Danbor í Esbjerg?

– Tað er ikki fyritøkan sum so man útilokar. Tað eru harafturímóti teir lokalitetir, infratrukturur oal. í Suðuroynni, sum eru eitt sindur trupul fyri ta slag av brúkligum rakstri vit skulu í gongd við í komandi leiting. M.a. hevur verið tosað um dýpið kring bryggjuna, sum ikki hevur verið nøktandi. Vit hava gjørt eina heildarmetan, og har rakk Drelnes ikki eins langt og hinar havnirnar. Og í slíkari leiting kann man ikki góðtaka at skula fáa trupulleikar við kei og øðrum lokalitetum.

Uppá fyrispurning hvussu ber tað til, at tá serfrøðingarnir hjá Danbor kunnu siga gott fyri Drelnesi og tvs. eisini fyri dýpinum har, at Statoilfólkini so koma til eina heilt aðra meting sigur Magne Skorpen, at dýpið er ikki tað rætta. Tað er millum 6 til 7 metrar. Kravið er frá 6 til 8 metrar, og tað er minimum. Tá talan er um størri útgerðarbátar er dýpið ikki gott nokk. Tað er í hvussu er á markinum til tað, sum kann góðtakast.

Men tá tikið verður samanum eru eisini onnur øki, har Norserv fekk færri stig enn hini samtøkini. Verður hugt eftir heilsu, trygd og umhvørvi, sum tó ikki hevur verið ein av høvuðsgrundgevingunum fyri at verða góðtikin, so vóru svarini frá Norserv vánalig sigur Magne Skorpen. Í eini samrøðu við Sosialin í farna mánað segði Steen Hansen frá Norserv annars, at nettupp økið trygd var nakað, sum teir stóðu sera sterkir.

Uppá fyrispurning um nú dýpið á Drelnesi hevði verið tað rætta, um Norserv tá hevði verið góðtikið sigur Skorpen, at tað ivast hann í, tí tað eru eisini onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi, og her leggur hann serligan dent á, at spurningarnir, sum Norserv fekk at svara, vórðu ikki nóg væl svaraðir. Talan var um rættiliga nógvar spurningar, sum gingu frá infrastrukturi/samferðslu til heilsu, umhvørvi, trygd, til útgerð, øki, kei osfr. Sosialurin skilur, at tað er Steen Hansen, stjóri í Danbor Service, og oddamaður í Norserv, ið hevur svarað spurningunum.


*Myndugleikarnir kundu bara sagt, hvar teir ynsktu útgerðarhavnina, heldur oljuvinnan*

### Útjaðarin

Magne Skorpen váttar annars, at hann og hansara fólk hava verið vitandi um, at løgtingið hevur samtykt, at útgerðarvirksemið skal eisini koma útjaðaranum til góðar. Í tí sambandi hava teir, sum skulu geva tilboð, fingið at vita, at útgerð í sambandi við dálking ol. skal liggja í Suðuroynni. Enn er ikki avgjørt, hvat slag av útgerð talan er um og hvussu nógv hon verður. Skorpen sigur, at talan kann blíva um nakað av virksemi.

– Hevði ikki borið til at sloppið undan tí stríði, sum nú eftir øllum at døma fer at taka seg upp politiskt, um tit høvdu lopið um prekvalifiseringina og bara havt eina útboðsrundu, har øll samtøkini vóru við?

– Tað kann man siga. Men í útgangstøðinum vórðu nógv fleiri, sum ætlaðu at vera við, og vit vildu vita frammanundan, hvørji hesi feløgini vóru og so sleppa at velja tey best egnaðu út. Hetta er vanliga mannagongdin.

– Men um tað nú komu kontraboð frá landsstýrinum, sum siga, at tað kann ikki góðtaka prekvalifiseringina, og at tit eru noyddir til at hava eina útbjóðing, har øll, eisini Norserv, eru við, hvat vilja tit so fyritaka tykkum?

– Alt hetta hevur verið uppi til umrøðu fyrr, men tað hevur ikki verið møguligt at fáa eitt greitt svar frá myndugleikunum, so okkara útgangspunkt hevur verið, at um myndugleikarnir í Føroyum vildu hava tað øðrvísi, so áttu teir at sagt frá tí fyrr.

Magne Skorpen sigur, at møguleiki hevði verið hjá myndugleikunum at komið inn og sagt, at øll feløg skuldu hava møguleika at bjóða, men tá áttu teir sum sagt at hava fingið hetta at vitað fyrr.

### Opnir

– Vit hava verið opnir alla tíðina og sagt frá til Oljumálastýrið, hvat vit arbeiða við og hvussu vit hava ætla at skipa hetta. Og tá vit ikki hava fingið nakra negativa afturmelding, hava vit hildið, at alt hevur verið í lagi. Vit hava mett okkum at tosa sama mál sum føroysku myndugleikarnir á økinum.

– Men um nú myndugleikarnir í Føroyum høvdu havt biðið tykkum um ikki at tikið eina prekvalifisering við, høvdu tit so slept henni?

– Vit síggja helst, at ein prekvalifisering verður hildin, men tá kundi hon so kanska verið gjørd út frá grundgeviningum/kriterium, sum myndugleikarnir høvdu sett, men slík eru sum sagt ikki komin. Magne Skorpen sigur, at teir hava sagt frá, at teir fóru undir prekvalifisering og eisini hvat hon fór at snúgva seg um. Og tá man einki mótspæl hevur fingið uppá tað, so hava teir koyrt víðari. -Vit halda okkum at hava fylgt spælireglunum, sum føroyskir myndugleikarnir hava ynskt.

Uppá fyrispurning um Suðuroyggin hevði staðið betri, um man har eisini hevði kunnað víst til havnina í Vági sigur Magne Skorpen, at tí hevur hann ongan møguleika at svara. -Eg veit ikki, um nakað av okkara fólkum hava sæð ta havnina.

# Lítil munur millum feløgini í Havn og Runavík

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Nú valið fer at fella á antin Havnina ella Runavík vil Magne Skorpen hjá Statoil ikki siga, hvør stendur betri. Tað vil útbjóðingin vísa. Men hann viðgongur, at tað er ikki stórur munur millum tey trý samtøkini, sum eru komin víðari. – Der er en liten forskell.

– Men er so ikki bara spurningurin, hvør tá kann geva lægsta tilboðið tvs. at tað eru pengar, sum nú skulu gera hetta av?

– Tað er tað ikki bara. Tí talan er eisini um ein tøkniligan og operationellan part.

Magne Skorpen sigur, at tað er ov tíðliga at siga nakað um, antin tann havnin, sum nú verður vald til basa, eisini fer at verða útgerðarhavnin í allari framtíð. – Her er talan um ein trý ára sáttmála, sum bara fevnir um boringina. Verður olja funnin og farast skal undir framleiðslu so rokni eg við eini nýggjari útbjóðing í sambandi við útgerðarvirksemi.

Magne Skorpen vísir at enda á, at skjøtil skal setast á útgerðarvirksemið um 1. mars. Verður hetta seinkað av eini ella aðrari orsøk, t.d. eini politiskari trætu ella hvat tað kann vera, so kann tað fáa avleiðingar fyri sjálvar boringarnar. Verða tær útsettar kann tað koma at kosta nógv fyri oljufeløgini, sum longu hava leigað boripallar ol. til komandi leiting.


*Runavík*



# Ósamdir um dýpið á Drelnesi

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Tað er ein bæði fáorðaður og ørkymlaður Steen Hansen, sum vit fáa í telefonina úr Esbjerg, tá vit biðja um fyrstu viðmerkingina til, at Norserv varð vrakað longu í innleiðandi umfarinum at bjóða uppá eina føroyska útgerðarhavn. Hann sigur seg lítið og einki skilja av tí støðu, sum Statoil hevur tikið.

– Eg havi fingið at vita frá Statoil, at tað er infrastrukturin í Suðuroynni, sum teir eru ónøgdir við, og at tað er ikki felagið Norserv sum so nakað er galið við sigur Steen Hansen, stjóri í Danbor og ein av oddamonnunum í Norserv á Drelnesi. Uppá fyrispurning, hvussu orðið infrastrukturur skal skiljast, hevur Steen Hansen onga viðmerking. Sosialurin hevur eisini spurt Magne Skorpen, hvussu manglandi infrastrukturur skal skiljast. Hann hevur tó ikki fleiri viðmerkingar til málið. (Sambært ensk-føroysku orðabókini merkir orðið infrastrukturur undirstøðukervið, blaðm)

Steen Hansen hevur annars onga viðmerking til úttalilsini hjá Magne Skorpen í Sosialinum (sí aðrastaðni í blaðnum) um, at nógvir av spurningunum, sum settir vórðu Norserv í sambandi við prekvalifiseringina, vórðu vánaliga svaraðir. – Hetta er nýtt fyri okkum. Tað havi eg einki fingið at vita um. Hann metir seg ikki hava givið vánalig svar.

Hvat annars viðvíkur dýpinum á Drelnesi, sum skal vera ein orsøk til støðuna, so viðgongur Steen Hansen, at tað finst ein kneysi ella líknandi nakrar metrar uttan fyri keiina, har dýpið bara er seks og ein hálvan metur. Men tað undrar hann, um hetta skal vera nokk til at koldøma Drelnes. Hetta er nakað, sum kann sprongjast burtur, og um tað var nakar trupulleiki, so heldur hann, at Statoil kundi spurt teir, hvat kundi gerast við hetta.

Steen Hansen er annars ósamdur við Statoil, tá tað snýr seg um dýpið. Teir hava ongantíð sæð tað sum nakran trupulleika. – Her í Esbjerg t.d. er dýpið 6,7 metrar, og tað er fult út nøktandi til tey stóru skipini, sum koma í havn her. (Magne Skorpen frá Statoil sigur aðrastaðni í blaðnum, at dýpið skal vera millum 6-8 metrar, blaðm.)

Soleiðis sum støðan er vorðin, so heldur Steen Hansen, at »løbet er kørt«. Málið er avgjørt. – Tað sær út til, at Statoil hevur tikið eina avgerð, og tí mugu vit bara boyggja okkum fyri.

Vit spurdu Steen Hansen, um tað hevði tænt søk suðuroyinga, um man ikki hevði hildið so fast uppá Drelnes men kanska eisini havt havnina í Vági við í myndini. – Tað skal eg ikki útiloka.


*Steen Hansen, stjóri í Danbor*

# Jørgen Niclasen óvissur um undirtøku

**Hósmorgunin verður samgongufundur um tilbúgvingarætlanina, og Jørgen Niclasen kann ikki siga við vissu, um hansara loysn fær undirtøku í samgonguni. Politiskur vilji er ikki til at lata marinustøðina taka sær av tilbúgving í sambandi við oljuvinnuna, hóast hon er tilreiðar at taka hesa uppgávuna á seg**

TILBÚGVING
*Stefan í Skorini*

Verður ein loysn ikki funnin á málinum um at skipa eina tilbúgvingarætlan í Føroyum, so verður eingin oljuboring undir Føroyum í ár. 1. apríl skal tilbúgvingin verða klár, so at føroyskir myndugleikar eru klárir, um ein vanlukka av onkrum slagi hendir í Føroyum

Fiskimálastýrið hevur arbeitt við tilbúgvingini í fleiri mánaðir, og fleiri samgongu- og landsstýrisfundir hava verið, men enn er einki komið uppá pláss í sambandi við MRCC-skipanina (Maritime Rescue Coordination Center).

Hósmorgurin klokkan 10 verður samgongufundur um málið, og tá skal støða takast til, um loysnin hjá Jørgeni Niclasen, sum hevur tilbúgvingina um hendi, skal samtykkjast.

Jørgen mælir til eina loysn, har øll tilbúgvingin verður á føroyskum hondum. MRCC-skipanin skal vera í Telegrafstøðini í Havn. Hesin bygningurin skal so keypast fyri 20 milliónir krónur, men hetta krevur eina eykajáttan frá tinginum.

Tað hevur verið ikki sørt av politiskum kegli um tilbúgvingina, og Jørgen Niclasen sigur seg hava fingið »misjavnar« útmeldingar frá politikarunum í samgonguni. Óvist er, um hinir samgongulimirnir vilja skipa MRCC-støðina eftir sama leisti, sum Fiskimálastýrið leggur upp til.

– Um henda loysnin ikki verður samtykt, so má eg bara royna eina aðra loysn, sigur Jørgen Niclasen.

Ein onnur loysn, sum talan eisini hevur verið um, er, at MRCC-skipanin í sambandi við oljuvinnuna verður á Marinustøðini í Havn, har núverandi MRCC-skipan longu er.

Marinustøðin hevur havt bjarging á sjógvi um hendi síðan 1969, men teir hava ikki ta neyðugu útgerðina til eisini at skipa fyri bjarging í oljuvinnuni.

Jesper Dinesen, ovasti á Marinustøðini sigur, at teir eru altíð tilreiðar at taka hesa uppgávuna á seg, men teir skulu hava boð um hetta frá donsku myndugleikunum.

Politiskur vilji er tó ikki fyri, at tilbúgvingin verður skipað av donskum myndugleikum. Landsstýrið tekur undir við eini føroyskari loysn.

Tjóðveldisflokkurin hevur ikki meldað nakað greitt út enn, meðan Sjálvstýrisflokkurin er heldur ivasamur.

– Tað skal vera ein føroysk loysn, eingin ivi um tað, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisflokksins, sum annars ikki kann siga nakað ítøkiligt um hetta málið enn, men hann heldur ikki, at tað er nøkur stór ósemja um hetta málið. Hann leggur afturat, at tað er alneyðugt, at tilbúgvingin verður klár skjótt, tí oljufeløgini bíða.

### Leggur seg ikki tvøran

Burðurin hevur verið tungur hjá hesi tilbúgvingarætlanini, sum hevur verið á veg leingi. Jørgen Niclasen sigur seg vænta og vóna, at ein loysn finst á málinum á samgongufundinum. Hann leggur afturat, at loysnin má finnast nú.

– Eg dugi ikki at siga beint nú, um neyðugu pengarnir verða játtaðir av samgonguni, tí misjavnar útmeldingar koma frá politikarunum, sigur Jørgen Niclasen.


*Jørgen Niclasen veit ikki við vissu, um hansara loysn í sambandi við tilbúgvingarætlanina verður samtykt av samgonguni. – Um hetta ikki fær undirtøku, so má eg bara royna okkurt annað, sigur Jørgen Niclasen*

– Eg havi sagt samgonguni, at eg fari ikki leggja meg tvøran fyri, at ein loysn verður funnin, tí vit kunnu ikki lata hetta málið draga út, sum við so nógvum øðrum.

– Okkara aðalmál er, at oljuboringin kann fara av bakkastokki í ár. Einasta uppgáva hjá føroyingum er at fáa MRCC-støðina at rigga, og tað hevði verið ótrúligt, um vit ikki kunnu klára tað, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen dugir ikki at meta um útlitini fyri, at MRCC-støðin verður klár og sigur, at um undirtøka ikki er fyri hesi loysnini, so má hann royna eina aðra.

Tað er at lata danskar myndugleikar ella Marinustøðina taka sær av henni ella at lata MRCC-støðina í Aberdeen taka um endan. Hesum mælir Jørgen Niclasen tó ikki til, men kanska er tað einasti útvegurin.

### Bygningur má fáast til vega

Um oljufeløgini skulu kunna fara undir royndarboringar fyrst í juni í ár, so má MRCC-skipanin vera virkin í seinasta lagi 1. apríl. Tí er neyðugt, at bygningur til hetta endamálið fæst til vega skjótast gjørligt.

Í einum tilmæli hjá Fiskimálastýrinum verður sagt, at Telegrafstøðin er besti bygningurin til hetta endamálið. Aðrir bygningar hava verið kannaðir, men teir lúka ikki tey neyðugu krøvini um trygd og fjarstøðu til bæði lands- og ríkismyndugleikar.

Í tilmælinum stendur, at tað er umráðandi, at MRCC-støðin liggur væl fyri, so at avvarðandi myndugleikar hava stutta fjarstøðu, um ein vanlukka hendir.

Eisini verður víst á, at møguleiki er fyri rationaliseringum, um Telegrafstøðin verður keypt. Har ber til at hava fleiri stovnar undir Fiskimálastýrinum undir somu lon.

Jørgen Niclasen sigur seg ikki vera sinnaðan at bíða við tilbúgvingarætlanini, men hon skal upp at koyra skjótast gjørligt.